Sjúkrarøktin á bachelor-stig:

# Sjúklingurin verður vinnarin

**- Hetta má metast at vera eitt tað størsta framstigið fyri sjúkrarøktarfakið í Føroyum, sigur Jana H. Dalsgaard, forkvinna í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktafrøðingar, nú nýggja bachelorútbúgvingin formliga verður partur av lærdum háskúla**

ÚTBÚGVING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Frá 1. januar 2006 verður Sjúkrafrøktarfrøðiskúli Føroya skipaður sum partur av Fróðskaparsetur Føroya. Jana H. Dalsgaard dylur ikki yvir, at hetta er ein formlig staðfesting av størsta framstigi fyri sjúkrarøktarfakið í Føroyum í nýggjari tíð, tá útbúgvingin varð lyft upp á akademiskt stig í 2003. Fyrstu næmingarnir á nýggju útbúgvingini verða lidnir í februar 2007, og verða tey tá samstundis tey fyrstu, sum standa við einum føroyskum bachelorprógvi í sjúkrarøkt í hondini.

### Skúladømi

Nýggja føroyska sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingin er ikki bara eitt stórt framstig fyri fakið, men eisini eitt skúladømi um, at tað loysir seg at halda eitt vakið eyga við tí, sum hendir í londunum rundan um okkum. Gamla sjúkrasystraútbúgvingin var eitt kopi av tí donsku útbúgvingini, og tá hendan skuldi broytast, varð greitt, at hetta eisini kom at hava avleiðingar fyri føroysku útbúgvingina.

Arbeiðið við at broyta donsku útbúgvingina tók rættiliga tíðliga eina heldur óhepna gongd. Úrslitið varð, at danir í dag standa við eini sokallaðari professiónsbachelorútbúgving uttan møguleika fyri beinleiðis víðari lestri.

- Vit vildu tryggju okkum, at tað sama ikki hendi í Føroyum. Tí settu vit okkum frá fyrsta degi sum mál at fáa eina reina bachelorútbúgving, sum gevur granskingarførleika umframt møguleika fyri at fara beinleiðis undir víðari lestur til hægri útbúgvingarstig, sigur Jana, sum frá byrjan hevur verið við í arbeiðinum at áseta innihaldið í nýggju útbúgvingini, ið byrjaði í 2001.

Nú føroyska sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingin hevur fingið bachelorheiti, minnir hon mest um ta íslendsku útbúgvingina. Hetta er bara at fegnast um, heldur Jana, havandi í huga at Ísland longi hevur gingið á odda í arbeiðinum at lyfta sjúkrarøktina upp á eitt akademiskt støði og á fleiri mátar er vorðið ein fyrimynd fyri onnur Norðurlond.



*- Hækkaða fakliga støðið á útbúgvingini eigur fyrst og fremst at koma tí einstaka sjúklinginum til góðar, sigur Jana H. Dalsgaard, forkvinna í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, nú Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya verður partur av Fróðskaparsetur Føroya*

### Vitan nærri sjúklinginum

Sambært Janu er eitt tað størsta framstigið við nýggju útbúgvingini, at hon gevur munandi meir rúm fyri vísundaligari gransking. Millum tey ymsu granskingarøkini nevnir hon eldrarøktina, sum eftir hennara tykki átti at verið tað fyrsta, sum fær ágóðan av nýggju granskingarmøguleikunum.

- Tað er ongin loyna, at eldraøkið í Føroyum hevur verið eftirbátur, tá tað ræður um at tilogna sær nýggja fakliga vitan, og tí hava vit raðfest hetta økið serliga frammaliga. Aðalmálið vil altíð verða, at granskingin fyrst og fremst kemur tí einstaka sjúklinginum til góðar, við tað at hon betrar um sjúkrarøktina. Eisini samfelagsliga fær granskingin stóran týdning í tann mun, at nýggj vitan jú hevur ein týdningarmiklan fyribyrgjandi leiklut, sigur Jana.

Hon vísir í hesum sambandi til eina stóra amerikanska kanning, sum týðiliga staðfestir neyva samanhangin millum fakliga støðið á sjúkrarøktini og sjúkugongdina hjá sjúklinginum. Sambært kanningini er tað als ongin ivi um, at eitt høgt fakligt støði hevur við sær betri sjúkarrøkt, færri komplikatiónir, styttri innleggingartíð og í síðsta enda eitt hægri yvirlivingarprosent.

Jana ivast ikki í, at hetta millum annað er prógv um, at eitt hægri fakligt støði fyrimyndarliga hevur við sær, at teori og praksis í størri mun verða samantvinnað.

- Onkur hevur fýlst á, at við at lyfta sjúkrarøktarfrøðina á eitt akademiskt støði verður hon samstundis flutt longur burtur frá dagligu sjúkrarøktini. Heldur tvørturímóti er tað júst tankin, at økta vitanin verður flutt nærri at sjúkrasongini, har hon kemur tí einstaka sjúklinginum til góðar, sigur Jana.

### Løn og praktikkpláss

Nú sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingin er lyft upp bachelorstøði, hevur tað eisini við sær, at lønarlagið má skipast øðrvísi. Jana hevur ta greiðu fatan, at eitt hægri útbúgvingarstig eigur at hava við sær, at lønin hækkar samsamsvarandi, og verður hetta tí ein av aðalspurningunum í komandi lønarsamráðingum. Arbeiðið við at broyta lønarviðurskiftini er tó longu byrjað, við tað at tey lesandi ikki longur fáa løn, men lestrarstuðul í lestrartíðini, samstundis sum byrjunarlønin hjá sjúkrarøktarfrøðingum er hækkað. Fakfelagið hevur longu tryggjað sær, at tey við kandidat- og masterútbúgvingum verða lønt sambært hóskandi kandidat lønarstiga. Gongst sum ætlað, verða nýggju sjúkrarøktarfrøðingarnir eisini umfataðir av hesum lønarstiga.

Ein annar praktiskur spurningur, sum felagið arbeiðir við í løtuni, er at tryggja sær, at praktikkplássini kunnu góðkennast av sjúkrarøktarfrøðiskúlanum. Hækkaða støði á útbúgvingini hevur, sum vera man, við sær, at leiðslan á praktikkplássinum í minsta lagi hevur eitt tilsvarandi útbúgvingarstøði. Sum er, sær hetta út til at kunna geva trupulleikar á ávísum stovnum innan sjúkrarøktina í Føroyum, og verður hetta tí ein spurningur, fakfelagið fer at taka upp við avvarðandi útbúgvingarmyndugleika í næstum.

Rektarin:

# Stúrir ikki fyri fakligum skilna

**Súsanna Mortensen, rektari á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum, stúrir ikki fyri, at broytingin í útbúgvingini fer at skapa fakligan skilna millum sjúkrarøktarfrøðingar.**

**- Mest sannlíkt er tað, at hetta skiftið fer at skapa eitt mennandi kjak og eitt nýtt forvitni kring fakið, heldur Súsanna**

ÚBÚGVING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Síðani nýggja bachelorútbúgvingin í sjúkrarøktarfrøði gjørdist veruleiki, hevur hetta sett munandi størri og øðrvísi krøv til bæði undirvísarar og námsfrøðiligu tilgongdina til fakið. Súsanna Mortensen er rektari á skúlanum og hevur millum annað námsfrøðiligu ábyrgdina av útbúgvingini um hendi.

### Størri tilvitan

At lyfta ein yrkisútbúgving upp á akademiskt støði, er ikki nakað, sum hendir frá degi til dags. Hetta hevur verið ein lang tilgongd, og enn eru nógvar menningaruppgávur eftir at loysa. Súsanna Mortensen er tó stak væl nøgd við tey úrslit, sum eru rokkin og royndirnar við nýggju útbúgvingini higartil. Allir lærararnir hava nú neyðugu master- ella kandidatútbúgvingarnar, og næmingarnir hava verið skjótir at laga seg til nýggju frálæruna.

- Vit sóu rættiliga skjótt, at nýggja akademiska tilgongdin til fakið endurspeglaðist í uppgávunum, sum næmingarnir lótu inn. Tað er heilt týðiligt, at næmingarnir nú fyrihalda seg munandi meir tilvita til tað vísundaástøðið, sum útbúgvingin byggir á, og at háttalagið er vorðið meir akademiskt, sigur Súsanna. Hon leggur afturat, at sagt á ein hátt 'fáa' næmingarnir ikki longur útbúgvingina, men 'taka' hana nettupp út frá øktu tilvitanini um, hvussu tú tilognar tær nýggja vitan. Hendan tilgongd tykist eisini verða meir í tráð við væntaninar og krøvini hjá nútímans lesandi, heldur Súsanna, sum kann staðfesta, at hækkaða støðið í øllum førum ikki hevur rætt næmingar frá at søkja á skúlan. Ikki færri enn 61 umsóknir vóru til tey 22 plássini í flokkinum, sum byrjar í februar 2006.

### Stúrir ikki fyri fakligum skilnaði

Hóast broytingin í útbúgvingini er stór, stúrir Susanna ikki fyri, at hetta fer at skapa fakligan skilna millum sjúkrarøktarfrøðingar við gomlu og nýggju útbúgvingini.

- Tað vísir seg, at tað, sum ofta hendir millum starvsfólk í einum slíkum skifti, er at eitt kjak uppstendur um, hví man ger, sum man ger. Hetta kann bara verða mennandi og fer uttan iva at skapa eitt størri forvitni kring fakið frá báðum síðum, sigur Súsanna. Hon leggur afturat, at vit eiga at ansa eftir, at vit ikki undirmeta virði á teimum drúgvu royndum, sum eldri sjúkarrøktarfrøðingar hava fram um onnur.

- Vit kenna øll tann vælkvalifiseraða praktikarin. Slíkar hava vit nógvar av innan sjúkrarøktarfrøðina í Føroyum. Uttan iva hevur hetta eisini gjørt sítt til, at føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar eru so nógv eftirspurdir aðrastaðni. Tær hava nevniliga ikki bara eina sera breiða vitan, men eru heldur ikki bangnar fyri at handla, sigur Súsanna.

Í løtuni verður arbeitt við at skipa ymisk endurútbúgvingartilboð til tey, ið hava tikið útbúgvingina eftir gomlu skipanini. Enn er alt ikki komið uppá pláss, men gongst sum ætlað, verða hesi tilboð á onkran hátt tvinnaði saman við nýggju útbúgvingina. Súsanna er ikki bangin fyri, at eldru sjúkrarøktarfrøðingarnir ikki fara at halda seg fram at hesum tilboðum, tí líka síðani nýggja útbúgvingin fór í gongd, hava nógvir fyrispurningar verið um møguleikan fyri dagføra gomlu útbúgvingina. Enn er tað tó ikki eitt krav, at eldru sjúkrarøktarfrøðingarnir endurútbúgva seg, men eitt tilboð, sum eftir ætlan verður klárt at bjóða fram í 2007.



*- Hækkaða fakliga støðið á útbúgvingini eigur fyrst og fremst at koma tí einstaka sjúklinginum til góðar, sigur Jana H. Dalsgaard, forkvinna í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, nú Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya verður partur av Fróðskaparsetur Føroya*